Fyrsta Føroyakvøldið í summar:

# Stúgvandi fult Sjónleikarhús



*Endabresturin á Føroyakvøldinum var føroyskur dansur. Tiltakið týskvøldið var útselt, og sum sæst á myndini, so nýttu gestirnir høvið at royna seg í føroyskum dansi.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Skráin til Føroyakvøldini er fjøllbroytt og spennandi, og við hjálp av royndum sjónleikarum, bendir nóg á, at Føroyakvøldini hjá Havnar Sjónleikarfelag fara at verða væl móttikin í ár.**

FØROYAKVØLD
*Páll Holm Johannesen*

Týskvøldið varð skipað fyri fyrsta Føroyakvøldinum í summar. Føroyakvøld er eitt tiltak, sum Havnar Sjónleikarfelag saman við Kunningarstovuni í Havn fyriskipar fyri okkara útlendsku gestum og føroyingum við, sum vilja uppliva føroyska mentan og mat.

Sum undanfarin ár er tað Sjónleikarhúsið, sum hýsir tiltakinum. Tey vitjandi kunnu gleða seg til eina fjøllbroytta og spennandi skrá. Skráin rúmar sjónleik, tónleik, dans, sang, søgur, sagnir, yrkingar og skjaldur. Umframt fjølbroyttu skránna, so fáa gestirnir eisini høvi at royna føroyskan mat.

Føroyakvøldini í Sjónleikarahúsinum verða hvørt týskvøld í summar, og hildið verður á til týskvøldið 26. august. Týskvøldið var so fyrsta almenna Føroyakvøldið í summar, og fyrireikararnir kunnu fegnast um, at tiltakið var útselt. Serliga útlendingar høvdu leitað sær í Sjónleikarhúsið, men eisini vóru føroyskir gestir at síggja.

Úr Havnar Sjónleikarfelag siga tey, at Føroyakvøldini verða ár eftir ár betri og betri vitjað, og serliga hava tey varnast, at føroyingar eisini eru farnir at taka tiltakið til sín.

## Góðar framførslur

Tað eru sjónleikarar úr Havnar Sjónleikarfelag, sum framføra. Sjónleikararnir eru royndir, og tað sæst eisini aftur á framførslunum, sum eru sannførandi. Birita Mohr og Egi Dam, sum bæði hava drúgvar royndir, standa fyri uppsetingini. Hon er fjøllbroytt, alt frá sagnum til yrkingar av okkara fremstu yrkjarum eru á skránni. Framførslurnar fara fram á enskum og skandinaviskum, og eisini sleppa útlendingar at hoyra tað føroyska málið.

Áskoðararnir týskvøldið sóu til hugnaðu sær eisini ófført. Søgnin um Sørinar Pól og Huldugentuna, og framførslan av yrkingini hjá William Heinesen um "Det muntre Nord" vóru hæddarpunktini á kvøldinum. Útlendsku gestirnir vóru sera hugtiknir av frálíku framførslunum, og ikki sørt av látri var at hoyra í salinum til framførsluna av yrkingini um "Det muntre Nord. Sangur og upplestur vóru eisini væleydnað.

Evnaríki, Uni Debes, stóð fyri tónleikinum, og við góðum gittarspælið hugtók hann eisini gestirnar í salinum í Sjónleikarhúsinum.

Eftir væleydnaðar framførslur var at enda farið upp á gólv. Føroyingar løgdu fyri við sýna fram vanligan føroyskan dans, gomlu ketu, sandoyardans og bandadans. Eftir, at gestirnir høvdu roynt føroyskan mat, fingu teir eisini høvi at royna seg í føroyskum dansi. Nógv nýttu møguleikan at sleppa upp á gólv, sum var endabresturin á einum væleydnaðum Føroyakvøldi hjá Havnar Sjónleikarfelag.


Maskina til sølu

HANIX H 36 A - árg 1998 - bert koyrt 2300 tímar
3 skuffur og hurtigskift




O.K. HEILSØLA & MASKINUR
FO-430 Hvalvík · Tlf. 422394 · Fax 422395
e-mail: okhammer@post.olivant.fo


# Hetlendingar ynskja mentanarsamstarv

**Hóast einki ítøkiligt er komið burtur úr, so eru føroyingar áhugaðir at samstarva við hetlendingar.**

MENTANARSAMSTARV
*Páll Holm Johannesen*

Shetland Council, sum er ovasti politiski myndugleiki í Hetlandi, hevur sett fram ynski um eitt mentanarsamstarv við føroyingar. Serliga eru teir áhugaðir í at samstarva um ítrótt, gransking og list. Virkandi landsstýrismaður í mentamálum, Høgni Hoydal, sigur við Sosialin, at føroyskir myndugleikar avgjørt eru áhugaðir i at samstarva við hetlendingar.

– Landsstýrið hevur samtykt, at vit skulu samstarva meir við okkara grannar í Norðuratlantshavið, og eitt mentanarsamstarv við Hetland hevur avgjørt áhuga, sigur Høgni Hoydal.

Tað er ikki komið nakað ítøkiligt á borðið, hvussu samstarvið skal skipast, men sum skilst fara Shetland Council og Mentamálaráðið at seta seg saman um kanna møguleikarnar við samstarvi millum londini bæði.


# Bilar

Nr. 113 • hósdagur • 19. juni 2003 • 77. árg.




*VW Touran innan. Bilurin er eisini tann fyrsti VW við elektromekaniskari servostýring sum standard*

# VW Touran - upp til sjey sitipláss

**VW eru komnir á marknaðin við einum nýggjum MPV. Talan er um VW Touran, sum er bygdur yvir nýggja Golf plattformin. Touran fæst sum fimm og sjey persónabilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

VW Touran er ein rúmligur MPV við nógvum ymiskum møguleikum til innrætting. Í standard útgávuni hevur Touran fimm sitipláss, men hann fæst eisini við sjey sitiplássum. Tey aftaru setrini kunnu flytast eftir ynski ella takast úr bilinum, um brúk er fyri stórum viðførisrúmi. Við fimm sitiplássum er viðførisrúmið 695 litrar. Mittasta baksetrið í mittastu rekkju kann gerast um til eitt borð. Nógv er gjørt fyri at bilurin skal verða arbeiðsligur og lættur at koma úr og í, og lessihæddin er lág.

Eisini er nógv gjørt burtur úr trygdini, bilurin hevur fýra airbag framman og høvuðairbag framman og aftan. Nakkastútturnar framman eru aktivar, hetta fyri at verja háls og nakka undir einum samanstoyti.

## Basis, Trendline og Highline

Touran verður gjørdur í trimum útgávum, hvat útgerð viðvíkur: Basis, Trendline og Highline. Í Basis útgávuni er bilurin útgjørdur við t.d. Climatic, hátrýstspularum á forlyktunum, el-rútum framman, el-síðuspeglum við hita, fjarstýrdum sentrallási, hita í setrunum og radio við fløguspælara. Trendline útgávan hevur eisini el-rútar aftan, fartpilot, koyriteldu og flúgvaraborð til tey ferðandi á baksetrunum. Highline er tann fínasta útgávan við sportsetrum framman, leðurratti, leðurgirknøtti og 16" alufelgum.

Í fyrstu atløgu kemur Touran við tveimum TDI dieselmotorum og einum FSI bensinmotori við beinleiðis innspræning. TDI motorarnir eru ávikavist 1,9 litur við 101 hk og 2,0 litur við 136 hk. FSI bensinmotorurin ein 1,6 litur við 115 hk. Seinni koma aðrir motorar við í skránna. Allar útgávurnar hava 6-trins girkassa sum standard.

Touran hevur eina nýggja fjaðraskipan, sum gevur bilinum góðar koyrieginleikar og gott vegtak. Bilurin er eisini tann fyrsti VW við elektromekaniskari servostýring sum standard. Servostýringin tilpassar seg automatiskt eftir koyriumstøðunum. Bilurin er lættur at stýra við lítlari ferð, tá man t.d. skal parkera, men stýringin blívur meira føst og beinleiðis, so hvørt sum ferðin veksur.




*VW Touran 1,6 FSI. Hesin bilurin hevur 7 sitipláss*






*VW Touran er ein rúmligur MPV við nógvum ymiskum møguleikum til innrætting*

### VW Touran 1,6 FSI

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,6 litur 4 syl. bensin 115 hk |
| 0-100 km/t | 11,9 sek |
| Bensinnýtsla | 13,4 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| <u>Stødd og vekt</u> | |
| Longd | 439,1 cm |
| Breidd | 179,4 cm |
| Hædd | 167,0 cm |
| Eginvekt | 1425 kg |
| Viðførisrúm | 695 / 1989 litrar |
| Prísur | kr. 255.000,- |
| <u>Søluumboð</u> | Bilasølan v/ Øssur Johannesen |
| | Vegurin Langi |
| | FO-188 Hoyvík |
| | 315354 |
| | www.audi-vw.net |